## Bogi Løkin fingið landsliðsboð

Enn ein landsliðsspælari hevur sent avboð til vinardystin, sum Føroyar mikukvøldið í næstu viku skal spæla í Portugal. Talan er um Christian Lamhauge Holst úr Lyngby, sum orsaka av skaða hevur boðað frá, at hann ikki verður førur fyri at spæla mikukvøldið. Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, hevur sent boð eftir Boga Løkin úr NSÍ um at koma við niður til Portugals. Bogi Løkin er miðvallari, og hann hevur seinastu árini verið á øllum teimum yngru landsliðunum. Seinasta landsliðið, sum hann hevur spælt á, er U21 landsliðið

## Eingin A-finala til Katrin og Julionnu

Katrin Olsen og Julianne Leander gjørdust júst ov stuttar. Katrin Olsen og Julianne Leander gjørdust nr. 4, og var tað ikki nóg mikið til at vinna seg í A-finaluna. Finnland, Niðurlond og Týskland vunnu seg víðari í A-finaluna. Katrin og Julianne rógva í B-finaluni, sum verður tíðliga sunnumorgun.

KÍ-VÍKINGUR

# Hetta er møguleikin hjá KÍ

**Men tað verður torført, tí víkingar fara fullmannaðir og við stórum sjálvsáliti til Klaksvíkar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir stóra vónbrotið á heimavølli ímóti B68 næstsíðsta mikukvøld var tað uppreisn, tá ið KÍ sunnudagin vann 2-0 á útivølli ímóti meistarunum í NSÍ.

Nú droyma klaksvíkingar um, at tað skal eydnast at fáa fatur á liðunum framanfyri og harvið lyfta seg upp um miðjuna. Um tað skal eydnast, so skal KÍ vinna fulla úrtøku burturúr tveimum teimum næstu uppgávunum, sum báðar eru á heimavølli.

Sunnudagin fer Víkingur at vitja í Klaksvík, og annan sunnudag – á 104 ára føðingardegi felagsins – fær KÍ vitjan av HB. KÍ hevur 20 stig, og bæði Víkingur og HB hava 26 stig.

Í Víkingi siga teir seg fara til Klaksvíkar í góðum treysti. Tað var ikki eftir bókini, at bara eitt stig fekst burturúr heimadystinum ímóti B71. Men ta ferðina vóru fýra leikbannaðir av teimum, sum eru sjálvskrivaðir millum teir fyrstu ellivu. Hesa ferð eru Hans Jørgen Djurhuus, miðverjararnir Atli Gregersen og Niclas Niclasen og nýggi landsliðsspælarin Andreas Lava Olsen tøkir aftur.

Magnus Skoralíð hevur verið burturstaddur. Hann hevur aftur verið til venjingar í hesi vikuni, men hann verður ikki við í Klaksvík. Unglingaspælarin Erling Jacobsen hevur staðið seg sera væl, síðani hann varð leigaður úr FC Amager. Í hesi vikuni er hann farin niður aftur á Amager, og harvið skal Anton Skoradal finna nýggjan mann at spæla á miðvøllinum í vinstru.

- Vit eru væl fyri, og vit fara til Klaksvíkar við góðum treysti um, at tað skal eydnast at vinna øll stigini og harvið styrkja um okkara støðu í kappingini um heiðursmerkini, verður sagt úr Víkingi.

Størsti skelkurin í Klaksvík var í fyrrakvøldið, tá ið álopsessið Rodrigo orsaka av trupulleikum í lærinum noyddist at taka seg úr venjingini. Teir vóna tó, at hann verður tøkur sunnudagin. Roknað verður eisini við, at Bjarni Jørgensen, sum orsaka av trælæri fór av vøllinum í Runavík, verður førur fyri at spæla í ovurmorgin.

Haraftur ímóti er tað greitt, at miðverjin Ove Nysted ikki verður tøkur. Hann hevur runnið fyri seg sjálvan, men hann hevur ikki verið førur fyri at vant saman við hinum í hesi vikuni. Kristian á Lakjuni og John Hammer eru langtíðar skaddir.



*Størsti skelkurin í Klaksvík var í fyrrakvøldið, tá ið álopsessið Rodrigo orsaka av trupulleikum í lærinum noyddist at taka seg úr venjingini. Teir vóna tó, at hann verður tøkur sunnudagin*

B71-ÍF

# Albert er bjartskygdur

**Talan verður um lyklauppgerð, tá ið ÍF fer at vitja B71, sum enn eina ferð skal spæla uttan Símin Hansen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjár varð vaktarskifti í Fuglafirði. Albert Ellefsen í Miðvági er nýggjur venjari hjá ÍF. David Jones, sum hevur havt ábyrgdina síðstu mánaðirnar, fer til hús. Partarnir eru samdir um at halda uppat við samstarvinum, er diplomatiska orðingin.

Fótbóltslagið í Fuglafirði hevur ikki verið gott seinastu vikurnar, og dropin, sum ivaleyst fekk bikarið at flóta yvir, var tapið á heimavølli mánakvøldið ímóti B68. Tá var avrikið ikki gott, og týskvøldið var langur fundur í Fuglafirði.

Albert Ellefsen vandi fyrstu ferð saman við ÍF hóskvøldið, og í kvøld skal avgerð takast um, hvørjir skulu manna liðið á Sandi sunnudagin.

Talan er um ógvuliga týdningarmikla uppgerð fyri báðar partar. B71 er á niðurflytingarplássi, og um ÍF einki fær til hús við sær, so fer tað at brenna meiri undir teimum, enn teir brýggja seg um.

- Eg havi longu staðfest, at tað eru nógvir evnaríkir spælarar í Fuglafirði. Har eru fleiri útlendingar, sum ikki av góðum grundum ikki kenni so nógv til. Serliga hugaligt er tað, at har eru so nógvir ungir spælarar, sum eru uppvaksnir í ÍF. Stórir møguleikar fyri menning eru í teimum. Nú ræður um at syrgja fyri, at plássið í bestu deildini verður varðveitt, og tað rokni eg við fer at eydnast, sigur Albert Ellefsen.

Hvat hevur tú við so stuttum skotbráði møguleika at gera?

- Fyrst og fremst at fáa spælararnar at trúgva upp á, at tað ber til. Tað er ógvuliga avgerandi, at lagið verður gott. Um teir sunnudagin vísa tað, sum eg eri vísur í, at teir megna, so fer tað at gangast væl.

Atli Petersen hevur ikki vant seinastu vikurnar. Hann var aftur til venjing í gjárkvøldið. Nenad Saric hevur trupulleikar við lærkrikanum. Í morgun var tað ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla sunnudagin.

Á Sandi bæði fegnast og iðra teir seg um, at tað endaði javnt í Gøtu sunnudagin. Undan fráferðini høvdu teir verið nøgdir við eitt stig, men sum tað myndaðist í 2. hálvleiki, so var sigurin tætt undir borðinum.

Símin Hansen sá reytt í Sarpugerði, og harvið er hann leikbannaður ímóti ÍF. Álopsspælarin Gudmund Nielsen hevur orsaka av knæskaða verið uttanfyri. Hann hevur vant saman við hinum í hesi vikuni, og hann verður við sunnudagin.

- Í fjør varð myndin skjótt greið eftir summarsteðgin. Soleiðis er tað ikki í ár. Eg kenni tað soleiðis, og tað vísti úrslitið hjá okkum í Gøtu eisini, at tað er møguleiki at taka stig frá øllum, og tað ger tað bara uppaftur meiri spennandi, staðfestir B71 venjarin Eli Hentze.